# Ferðafólkakanning 2019

Publiceret af Laila Hentze
27 april 2020 klokken 03:04

# Samandráttur av ferðafólkakanningini 2019 (Stabbamyndir: allir svarpersónarnir)

(Charts: All Respondents)  Stutt um kanningina:
- Visit Faroe Islands, Visit Tórshavn og Tórshavnar Havn hava umbiðið Gallup-kanningina.
- Frágreiðingin er grundað á persónlig interview, sum Gallup Føroyar hevur gjørt í tíðarskeiðnum 25. juni – 22. august 2019.
- 7 interviewarar hava innsavnað data við at tosa við útlendsk ferðafólk. Málið var upprunaliga 500 interview. Vit hava gjørt 560 interview.
- Vit hava brúkt teldlar. Spurnarblaðið við 20 spurningum var á enskum og donskum. Vit hava strembað eftir at fáa eina góða umboðan viðvíkjandi kyns-, alburs- og upprunabýtið.
- Svarini eru tastað beinleiðis inn á skipanina hjá okkum, meðan interviewini vóru framd.
- 620 útlendsk ferðafólk, 18 ár ella eldri vórðu útvald. Av teimum hava 560 svarað spurningunum. Svarratan er 90%, sum er sera høgt. Tey eru øll navnleys.
- Kanningin er farin fram á trimum støðum, har ferðafólkini vóru á veg avstað úr Føroyum:
Flogvøllinum í Vágum => 291 interview (52%)
á keiini, har Norrøna leggur at => 126 interview (23%)
úti á molanum, har Cruise skip leggja at => 143 interview (25%)
- Prosentbýtið samsvarar nøkulunda við býtið millum, hvussu ferðafólkbýtið eru skrásett at koma til Føroya.

Metoda og fyrivarni. - Á innleiðandi fundum millum partarnar var tal og slag av spurningum viðgjørt. Ynski var at savna datatilfar inn frá trimum segmentum fyri at fáa eina heildarmynd av støðuni og at samenbera segmentini, sum eru ymisk og hava ymiskar ynskir og tørvir. Úrslitini geva greiðar ábendingar um nøgdsemisstig, vøkstur í ávísum tjóðskapum, sum ikki hava vitjað Føroyar so nógv áður og mun millum segmentini. Úrslitini eru valid, tí vit hava úrslit frá øðrum kanningum, sum vísa á leið somu úrslit, t.d. á somu manglar, ynskir og nøgdsemi. Tó kann ein vansi vera við grundarlagnum at rokna miðalnýtsluna hvørt segmentið sær, tá talið av respondentum í teimum trimum segmentunum so verður lutfalsliga lágt. Eitt hóskandi tal kundi verið at spurt 500 respondentar í hvørjum segmenti fyri at fáa eitt enn betri grundarlag fyri miðalnýtsluni, men atlit skuldu eisini takast til tann fíggjarliga partin. Respondentarnir kundu velja millum ymiskar nýtslubólkar í krónum. Tað er lættari at fyrihalda seg til hjá respondentunum og lættari at arbeiða við sum taltilfar. Partarnir tosaðu um møguleikan at hava opið felt í staðin, so vit skrásettu ta upphæddina, sum respondenturin nevndi, um kanningin verður gjørd aftur. Vansin við opnum felti er, at tað verður ringt at samanbera og ein fær ikki gjørt eina sigandi stabbamynd, men bert eitt miðaltal og tískil eru frammanundan defineraðir nýtslubólkar tann betra loysnin.

Høvuðsorsøkin at vitja Føroyar. - 68% av teim spurdu, sum fóru við Norrønu og 68% av teim spurdu á Flogvøllinum svaraðu, at náttúran var høvuðsorsøkin til, at tey vitjaðu Føroyar.

Nøgdsemi. - Samanumtikið eru tey flestu ferðafólkini sera væl nøgd við upplivingarnar í Føroyum. Tey halda, at føroyingar eru sera vinarligir og hjálpsamir. Á einum stiga frá 1-5 geva tey 560 ferðafólkini karakterin 4,1 fyri keypsmøguleikarnar í Tórshavn og 4,4 fyri tænastustøðið í handlum, á matstovum og caféum í Havn. Tó ynskja ferðafólk longri upplatingartíðir, eisini sunndagar, betri kunning um tørvin at bíleggja pláss á matstovum frammaundan, tí nógv gingu runt frá matstovu til matstovu og fingu einki pláss, svong aftaná dagstúrar og endaðu í burgarbar. Eisini er ynski um matstovur við miðalprísum umframt hægri tænastustøði. Spurd um, hvussu nøgd tey eru við upplivingarnar í Føroyum sum heild, geva tey karakterin 4,7 út av 5.

Nýtsla í Tórshavn. - Hyggja vit eftir, hvussu stórur prosentpartur av ferðafólkunum brúktu millum 90-100% av teirra pengum í Tórshavn, svaraðu 43% av Cruise, 8% á Flogvøllinum og 5% við Norrønu, at tey brúktu næstan allar sínar pengar í Tórshavn. Hinvegin svaraðu 41% av Cruise, 8% frá Flogvøllinum og 4% av Norrønu, at tey brúktu ongar pengar í Tórshavn.

Miðalaldur og miðalsteðgur í Føroyum. - Miðalaldurin á teimum spurdu ferðafólkinum er 52 ár. Í miðal yvirnátta ferðafólkini 4,7 nætur í Føroyum. Býtt út á tey trý segmentini yvirtnátta ferðafólkini umvegist flogvøllin 6,3 nætur í Føroyum í miðal, Cruise ferðafólkini vitja 1,1 dag í miðal, meðan Norrøna ferðafólkini yvirnátta 5 nætur í miðal.

Hvar gista ferðafólkini? - Helvtin av teimum spurdu við fráferð við Norrønu gista á Campingøkjum, 1/5 á Airbnb og somuleiðs 1/5 á hotellum. Helvtin av teimum spurdu á flogvøllinum gista á hotellum, meðan 45% brúka Airbnb og nøkur gista hjá vinum/familju og nøkur fá valdu Camping. Ferðafólk við stórum autcamparum hava trupult at finna stór P-pláss í Havn, bert lítil P-pláss at finna.

Nýtsla seinasta døgnið. - Sambært upplýsingunum søgdu 9% av øllum respondentunum seg ikki hava brúkt pengar seinasta døgnið áðrenn fráferð. Um vit hyggja eftir teimum trimum segmentunum, so svaraðu 2% av ferðafólkunum á Flogvøllinum og 2% av respondentunum sum sigldu við Norønnu, at tey ikki høvdu brúkt pengar seinasta døgnið, meðan 31% av Cruise respondentunum svaraðu, at tey ikki høvdu brúkt pengar seinasta døgnið. Hyggja vit nærri eftir hesum 31% (45 Cruise ferðafólk), so høvdu 36 Cruise ferðafólk svarað "ja", at tey høvdu bílagt útferð, áðrenn tey komu til Føroya og sostatt goldið útferðina, áðrenn tey komu til Føroya, men tey brúktu ongar pengar annars, meðan tey vóru í landi. 9 Cruise fólk svaraðu, at tey høvdu hvørki bílagt útferð, áðrenn tey komu ella brúkt pengar seinasta døgnið. Tey høvdu verið gongutúr ella ókeypis busstúr í Havn. Viðmerkjast skal, at einstøk Cruise ferðafólk søgdu, at tey høvdu brúkt nógvar pengar (upp í 35.000 DKK), tí tey keyptu føroyska list, men tey kundu bert velja svarmøguleikan "Yvir 18.000 DKK". Fleiri av Cruise ferðafólkunum, sum vit tosaðu við, vildu keypa serstøk føroysk ting og høvdu reiðan pening við, men antin fingu tey ikki tíð at keypa, handlarnir vóru stongdir, tá tey komu aftur til Havnar ella funnu tey ikki røttu handlarnar. Eisini vóru dømi um, at handlar ikki tóku ímóti teirra gjaldoyra (t.d. dollarum og pundum).

Bókaðar útferðir. - Vit síggja stóran mun á teimum trimum segmentunum, tá vit hyggja eftir, hvør bókar útferðir undan sjálvari ferðini. 64% av Cruise-ferðafólkunum høvdu bókað útferðir heimaífrá (oftast bussferðir), meðan 41% av spurdu ferðafólkunum á Flogvøllinum (oftast túrar við báti) og 13% av spurdu ferðafólkunum, sum ferðaðust við Norrønu høvdu bókað útferðir heimanífrá. Hesi síðstnevndu hava sjálvi bil við og koyra sjálvi runt oyggjarnar, so tey bóka í høvuðsheitum túrar við báti.

Nýtsla í alt. - Tey spurdu svaraðu eisini, hvussu nógv tey í miðal mettu seg hava brúkt á ferðini í Føroyum sum einkultpersónar, tá útreiðslur til flogferðir, Cruise og Norrøna ikki vóru íroknaðar. 9% høvdu ikki brúkt pengar. 32% søgdu seg hava brúkt undir 3.000 DKK. Býtt út á segmentir brúktu 19% umvegis flogvøllin, 50% við Cruise og 40% við Norrønu undir 3.000 DKK í alt. 16% søgdu seg brúka millum 3 - 6.000 DKK. Býtt út á segmentir brúktu 16% umvegis flogvøllin, 3% við Cruise og 30% við Norrønu millum 3 - 6.000 DKK. 17% brúktu millum 6 - 9.000 DKK. 18% brúktu 11.000 DKK ella meira, flestu av hesum ferðaðust um flogvøllin.

At enda í kanningini bar til hjá ferðafólkunum at gera viðmerkingar í tveimum spurningum: Betringar, sum tey vildu viðmæla handlunum at gera fyri at tekkjast ferðafólki meira og hin var at viðmerkja eitthvørt viðkomandi til ferðavinnuna og myndugleikar í Føroyum. Sera nógv ferðafólk eru ógvuliga væl nøgd við ferðina í Føroyum, bæði við upplivingar, náttúru umframt vinarligar og beinasamar føroyingar. Nógv vísa á, at føroyingar mugu ansa eftir ikki at fáa ov nógv ferðafólk til Føroya, tí tað kann oyðileggja náttúruna, sjarmuna og tað serstaka. Nógv ferðafólk vísa á manglandi skelti og kunning, tá tey koyra runt í Føroyum og hava trupult at finna vegin fram til ávís støð. Onnur halda, at kunningin burdi verið betri frá ávísum veitarum, til dømis SSL, har meira kunning kundi verið á enskum á heimasíðuni og sum var løtt at finna. Nógv halda, at leigubilarnir eru alt ov dýrir samanborið við onnur ferðamál. Í Føroyum vanta vanligar matstovur við einum hampuligum miðalprísi. Her eru góðar og dýrar matstovur og so burgara- og pitsabarir, men einki í millum, sum ferðafólk eisini vilja hava. Eisini eru nógv ónøgd við verandi óskil í samband við gongutúrar í náttúruni, tí onkrastaðni skal ein rinda nógv fyri ein túr, meðan aðrastaðni er tað ókeypis. Tað vantar ein felags leistur fyri at ganga í náttúruni.

## Ferðafólkakanning 2019

Publiceret af Laila Hentze
27 april 2020 klokken 03:04

## Would you like to participate?

620 tourists were asked to participate. 560 of them (90%) gave their consent.



| | |
|---|---|
| **Total** Graf filtre. Would you like to participate? : Yes, No. The interview is made:: At the airport, By the harbour (Cruise), By the harbour (Norrøna i.a.) | **560** |
| Yes | 560 |
| No | 0 |
| TEST | 0 |

## The interview is made:



| | |
|---|---|
| **Total** Would you like to participate? : Yes, No. The interview is made:: At the airport, By the harbour (Cruise), By the harbour (Norrøna i.a.) | **560** |
| At the airport | 291 |
| By the harbour (Cruise) | 143 |
| By the harbour (Norrøna i.a.) | 126 |

## Gender?



**Total** Would you like to participate? : Yes, No. The interview is made:: At the airport, By the harbour (Cruise), By the harbour (Norrøna i.a.) **560**

| | |
|---|---|
| Male | 53,6% |
| Female | 46,4% |

## How old are you? (Which age group)

Average for all respondents: 52 years. Airport: 47 years, Cruise: 62 years, Norrøna: 51 years.




**Total** Would you like to participate? : Yes, No. The interview is made:: At the airport, By the harbour (Cruise), By the harbour (Norrøna i.a.) **560**

## In what country/which region do you live?

20% of all respondents: USA/Canada, 19%: Great Britain, 13%: Germany, 9%: Denmark, 6%: France.
If the 20% from USA/Canada are split into the three segments, then the figures are: Cruise: 34%, Airport: 21% and Norrøna: 1,6%




**Total** Would you like to participate? : Yes, No. The interview is made:: At the airport, By the harbour (Cruise), By the harbour (Norrøna i.a.) **560**

Grafen fortsætter på næste side

Fortsat fra forrige side

## In what country/which region do you live?

20% of all respondents: USA/Canada, 19%: Great Britain, 13%: Germany, 9%: Denmark, 6%: France.
If the 20% from USA/Canada are split into the three segments, then the figures are: Cruise: 34%, Airport: 21% and Norrøna: 1,6%




**Total** Would you like to participate? : Yes, No. The interview is made:: At the airport, By the harbour (Cruise), By the harbour (Norrøna i.a.) **560**

## What was the main reason you travelled to the Faroe Islands?

Explanation regarding "Other": Respondents mainly travelling with Norrøna or Cruise answered main reason as "other", because they visited the Faroe Islands on their way to Iceland which was the main reason to travel to the North.




**Total** Graf filtre. Would you like to participate? : Yes, No. The interview is made:: At the airport, By the harbour (Cruise), By the harbour (Norrøna i.a.) **560**

## Did you prebook any excursion(s)? On board or at home?

41% of airport respondents said “yes” they prebooked while 64% of Cruise respondents did prebook, but only 13% of Norrøna respondents prebooked.



**Total** Would you like to participate? : Yes, No. The interview is made:: At the airport, By the harbour (Cruise), By the harbour (Norrøna i.a.) **560**

| | |
|---|---|
| Yes | 40,7% |
| No | 59,3% |

## If yes, which excursion(s) or activities did you prebook?

(Only the respondents, who prebooked)




**Total** Would you like to participate? : Yes, No. The interview is made:: At the airport, By the harbour (Cruise), By the harbour (Norrøna i.a.) **228**

## Did you spend money on one or several of these categories? If yes, please state which one(s)?




**Total** Would you like to participate? : Yes, No. The interview is made:: At the airport, By the harbour (Cruise), By the harbour (Norrøna i.a.) **560**

## Approximately, how much did you spend during the last 24 hours? (Accommodation not included)




**Total** Would you like to participate? : Yes, No. The interview is made:: At the airport, By the harbour (Cruise), By the harbour (Norrøna i.a.) **560**

## Approximately, how much did you (not your family) spend in total during your stay in the Faroe Islands? (Flights, cruise ships or Norrøna expenses not included)




**Total** Graf filtre. Would you like to participate? : Yes, No. The interview is made:: At the airport, By the harbour (Cruise), By the harbour (Norrøna i.a.) **560**

## How many percentages of your spenditure did you spend in Tórshavn and surroundings?

Approximately 15% of total did not spend anything while 37% used half or more of their spendings in Tórshavn.




**Total** Would you like to participate? : Yes, No. The interview is made:: At the airport, By the harbour (Cruise), By the harbour (Norrøna i.a.) **560**

## On a scale from 1 to 5, where 1 is very unsatisfied and 5 is very satisfied, how satisfied are you with the purchasing options in Tórshavn?

Average of all respondents: 4,1 of a total of 5.




**Total** Would you like to participate? : Yes, No. The interview is made:: At the airport, By the harbour (Cruise), By the harbour (Norrøna i.a.) **560**

## On a scale from 1 to 5, how satisfied are you with the experienced service level in shops, restaurants and cafées in Tórshavn?

Satisfaction level of all respondents: 4,4 of a total of 5.




**Total** Would you like to participate? : Yes, No. The interview is made:: At the airport, By the harbour (Cruise), By the harbour (Norrøna i.a.) **560**

## Are there any improvements you would like to recommend that shops should do in order to increase your interest to buy more products?

Due to the volume of the responses, they are delivered in a separete document.




**Total** Would you like to participate? : Yes, No. The interview is made:: At the airport, By the harbour (Cruise), By the harbour (Norrøna i.a.) **560**

## On a scale from 1 to 5, where 1 is "very unsatisfied" and 5 is "very satisfied", how satisfied are you with you overall experience in the Faroe Islands?

Satisfaction level of all respondents: 4,7 out of 5.




**Total** Would you like to participate? : Yes, No. The interview is made:: At the airport, By the harbour (Cruise), By the harbour (Norrøna i.a.) **560**

## Is there anything else you would like to add in connection with this interview?

Due to the volume of the responses, they are delivered in a separete document.




**Total** Would you like to participate? : Yes, No. The interview is made:: At the airport, By the harbour (Cruise), By the harbour (Norrøna i.a.) **560**

## What was the total length of your stay in the Faroe Islands?

Average for all respondents: 4,7 nights




**Total** Would you like to participate? : Yes, No. The interview is made:: At the airport, By the harbour (Cruise), By the harbour (Norrøna i.a.) **560**

## During your stay in the Faroe Islands, in what type of accommodation did you stay overnight?

30% of all respondents stay on hotels and 28% use Airbnb. 1/4 did not stay overnight, because they were respondents from Cruise. Half of Norrøna respondents stayed on camping sites, while 1/5 stayed on hotels and 1/5 stayed in Airbnb. Almost half of Airport respondents stayed on hotels and 45% of Airport respondents stayed in Airbnb. Some did stay with friends or family.




**Total** Would you like to participate? : Yes, No. The interview is made:: At the airport, By the harbour (Cruise), By the harbour (Norrøna i.a.) **560**